gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Trúboðan í miðdeplinum

**Samfelagsstevnan á Skálafjørðinum fer serliga at snúgva seg um missiónina, sum m. a. verður viðgjørd í framsýning, har nógvir bólkar taka lut**

TÍÐINDASKRIV

Brøðrasamkomurnar í Eysturoy skipa á hvørjum ári á páskum fyri tí, sum verður kallað fyri samfelagsstevnu. Annaðhvørt ár eru tað samkomurnar eystanfyri Gøtueið, sum skipa fyri, og annaðhvørt ár eru tað samkomurnar á Skálafjørðunum, sum skipa fyri. Í ár eru tað samkomurnar í Nerija á Skála, í Elim í Søldarfirði, í Berøa í Saltangará og í Nebo á Toftum, sum skipa fyri. Og tað verður trúboðan ella missión, sum verður høvuðsevni á stevnuni. Sjøtul verður settur á við evangeliskum møti í Nerija á Skála skíriskvøld klokkan sjey. Langa fríggjadag og hinar dagarnar verður stevnan í ítróttarhøllini í Runavík.

Samkomurnar í Føroyum eru uppi í nógvum trúboðanarverki, bæði í Føroyum og í fleiri øðrum londum. Á stevnuni verður millum annað upplýst um trúboðanarverk, sum verður gjørt, um tørvir, sum ikki eru nøktaðir og um verk, sum tað er ætlanin at fara undir.

Samkomurnar, sum bjóða inn til stevnuna, siga, at skriftin leggur stóran dent á, samkomur og einstaklingar eru við í missión og kenna ábyrgd yvirfyri missión. Missión er ein máti at dýrdargera Gud og Frelsara okkara, og tí er tað týdningarmikið, at hetta verður havt frammi, verður sagt frá brøðrasamkomunum á Skálafjørðinum.

Fyrireikararnir vóna, at stevnan kann vera við til at gera tilvitanina um tann týdningarmikla partin av samkomulívinum, sum missión er, størri enn hon er í dag. Tað skal ikki skiljast soleiðis, at hetta ikki longu er ein partur av samkomulívinum, men heldur soleiðis, at stevnan kann vera við til at birtia upp undir og kveikja, og at nýtt ljós kann kastast yvir missiónina og týdningin, sum hon hevur.

Tilrættaleggingin
Ein partur av stevnuni eru fundirnir, har tað út frá skriftini fer at verða tosa um evni, sum hava við missión at gera. Harafturat fara onkur, sum hava verið í trúboðanarverki og onkur, sum eru á veg út í trúboðanarverk, at greiða frá teirra royndum og teirra ætlanum.

Ein annar partur av stevnuni er ein framsýning. 21 felagsskapir, sum á ein ella annan hátt hava við missión at gera, fara at taka lut á framsýningini. Hon verður í ítróttarhøllini, og hon verður opin undan fundunum og aftaná fundirnar.

Tey, sum fara at hava orðið, og sum fara at sýna fram, verða úr samkomunum í Føroyum. Onkrir av trúboðarunum, sum dagliga arbeiða uttanfyri landoddarnar, eru heima og fara at taka lut. T. d. Símin í Túni, sum síðani 1975 hevur verið í Venezuela, og Øssur Berghamar, sum síðani 1972 hevur verið í Danmark.

**Nógvur sangur**
Í sambandi við samfelagsmøtini kemur ein nýggj útgáva av sangheftinum Lova Harranum, sum tey seinnu árini hevur verið nógv brúkt í samkomunum m. a. í Eysturoy. Nógvur felagssangur verður, og hann verður umframt úr hesum heftinum eisini úr Songbók Guds Fólks. Onkur missiónssangur, sum so at siga ongantíð áður hevur verið frammi, fer at verða sungin.

Kór og bólkar úr samkomunum fara at taka lut. Leygarkvøldið klokkan tíggju verður ein serlig sangløta, har felagssangur, kórsangur, solo, duett, trio og kvartett sangur er á skránni. Tað verður lagt upp til, at fólk í øllum aldri skulu koma til hesa løtuna.

Serlig tiltøk vera fyri ung. Hesi vera langa fríggjakvøld og páskakvøld í Berøa í Saltangará. Eisini á hesum tiltøkunum verður reyði tráðurin missión.

# Páskir

**Golgataverkið**

Teir tóku nú Jesus; og hann bar sjálvur kross sín og gekk út á tann staðin, sum kallast Ennistaðurin, og sum á hebráiskum eitur Golgata. Har krossfestu teir hann og saman við honum tveir aðrar, ein hvørjumegin, men Jesus í miðjuni. Men Pilatus skrivaði eisini eina yvirskrift og setti hana á krossin; har stóð skrivað: »Jesus úr Nasaret, kongur Jødanna«. Hesa yvirskriftina lósu nú mangir av Jødunum, tí at staðurin, har sum Jesus varð krossfestur, var nær við bygdina, og hon var skrivað á hebráiskum og rómverskum og grikskum máli. Tá søgdu høvuðsprestar Jødanna við Pilatus: »Skriva ikki: Kongur Jødanna; men: Hann segði: Eg eri kongur Jødanna«. Pilatus svaraði: »Tað, sum eg havi skrivað, havi eg skrivað«. Tá ið nú hermenninir høvdu krossfest Jesus, tóku teir klæði hansara og býttu tey sundur í fýra lutir, hvørjum hermanni ein lut, somuleiðis kyrtilin; men kyrtilin var óseymaður, vovin í einum oman ígjøgnum. Teir søgdu tí hvør við annan: »Latum okkum ikki skera hann sundur, men latum okkum heldur kasta lut um hann, hvør ið skal fáa hann«; tí at skriftin skuldi ganga út: »Teir býttu klæði míni millum sín, og kastaðu lut um klædning mín«. Hetta gjørdu nú hermenninir. Men við Jesu kross stóð móðir hansara og móðursystir hansara, Maria, kona Kleopasar, og Maria Magdalena. Tá ið nú Jesus sá móður sína og lærusveinin, sum hann elskaði, standa har, sigur hann við móður sína: »Kvinna, har er sonur tín!« Síðan sigur hann við lærusveinin: »Sí, har er móðir tín!« Og frá teirri stund tók lærusveinurin hana heim til sín. Eftir hetta, tá ið Jesus visti, at alt nú longu var fullgjørt, til tess at skriftin skuldi ganga út, sigur hann: »Eg eri tystur«. Har stóð eitt ker fult av ediki. Teir settu tá ein svamp fullan av ediki á ein ýsopslegg og bóru honum at munni: »Tað er fullgjørt!« Og hann boygdi høvdið og gav upp andan. Jóhs. 19, 17–30.

Vit hava nú ígjøgnum føstutíðina hoyrt um Jesu líðing, hvussu hann var háðaður, sligin, áspýttur, húðflongdur, tornakrýndur og til seinast hongdur á krossin á Golgata, har hann kvittaði fyri alla heimsins synd, tína og mína synd, soleiðis sum tað stendur skrivað hjá Jesaja profeti kapittul 53, ørindi 5. Men hann varð særdur vára synda vegna og sundurbrotin vára misgerða vegna; okkum til friðar kom revsingin niður á hann, og av sárum hans fingu vit heilsubót.

Føstan er eftir míni sannføring ein ógvuliga álvarsom tíð, og skuldi hetta kunna havt ávirkan á atferð okkara hesar vikurnar undan páskum, um vit hugsa um hvørja viðferð okkara Harri og frelsari fekk okkara vegna; nú er tað soleiðis at kristindómurin hevur havt sera stóra ávirkan á dagligdagin hjá føroyinginum, tá menn fóru í bjørgini, tað verði seg eftir fugli ella seyði, so løgdu teir lív og lagnu sína í Guds hendur í áliti á at Gud sum øllum valdar og hevur allar træðir í síni almáttugu og sterku hond, hann er við teimum á hesi vandafullu ferð; tíanbetur er hesin vakri siður fyri ein stóran part varðveittur her á landi, tað hava vit til dømis sæð í sjónvarpinum av og á, og er hetta at fegnast um; eisini hoyra vit frásagnir frá gomlum monnum, at sungið varð á útróðrarbátum, bæði tá teir fóru til útróðrar og somuleiðis tá teir komu aftur av útróðri, hetta eru siðir, sum ikki áttu at verið niðurlagdir, sjálvt um motorarnir hava avloyst árarnar, kundi hetta hildið áfram sum áður.

Hóast alt hetta, sum eg her havi nevnt, so tykir mær at tað her á landi er nógv, sum er farið av lagi á tí andaliga økinum, tað við føstuni verður tíanverri ikki tikið í nóg stórum álvara; fyri bara at nevna føstugudstænasturnar í kirkjum okkara. Tað eru ikki mong, sum leita inn í Guds hús fyri at lýða á Jesu líðingarsøgu; ein av føstusálmum okkara í sálmabókini byrjar soleiðis: Legg nú niður verðsligt sinni, búgv nú væl títt hjarta til, lat ei eiga pláss har inni tað, sum spilla av sær vil. Hetta áttu vit at tikið til eftirtektar, soleiðis at vit í føstutíðini búgva okkum til av álvara at taka ímóti páskahátíðini, við gleði og áhaldandi tøkk fyri at Gud sendi okkum son sín, læt hann líða og doyggja og rísa upp aftur úr grøvini páskamorgun, fyri harvið at bjarga okkum frá banning syndarinnar og ævigum deyða.

Hvørja ávirkan hevur hetta á okkum, sum liva í dag, hetta sum Jesus, Guds einborni sonur mátti ígjøgnum fyri aftur at geva mannaættini ein møguleika at koma inn aftur í paradísið, sum vegna syndina var stongt hin lagnutunga dagin í Eden aldingarði, tá ormurin tøldi Evu, soleiðis at hon át av ávøkstrinum á trænum og gav manni sínum og hann eisini át av trænum, men við Jesu deyða og uppreisn er opnað aftur, soleiðis at ein og hvør, sum viðgongur synd sína og kemur til Jesus og biður um fyrigeving fyri synd sína og ólýdni ímóti honum, fær at uppliva ta somu gleði og friðsælu, sum Ádam og Eva áttu áðrenn syndafallið.

Tað er undurfult at uppliva Golgata verkið, Jesu deyða og uppreisn fyri mína skuld, ja, tað er nakað, sum tunga ei dugir mæla, tað er nakað, sum man má uppliva; o, tann sæla stund, tá Jesus tók syndabyrðina av herum mínum; eg eri fríur í Jesusi Kristi, alt av hansara náði, tí kann eg vitna um hansara kærleika móti mær, at allar mínar syndir bar hann upp á krossin, hann leyskeypti meg frá banning syndarinnar, ja, hann setti føtur mínar á klettin, sum er Jesus sjálvur.

Ongum nýtist at knógva undir syndabyrðuni, tað liggur eitt kvittað skuldabræv við krossins fót á Golgata; tað einasta tú hevur at gera er at boyggja teg niður við krossin, takka Jesusi fyri at hann doyði og reis upp úr grøvini páskamorgun eisini fyri teg, tá er tað kvittaða skuldarbrævið títt, undirskrivað, ikki við blekki, men við dýrabara blóði Jesusar, tá ert tú fríur ella frí og kanst hvíla í Guds náði, soleiðis at tú kanst taka undir við Pæturi ápostli, tá hann sigur í fyrsta brævi sínum: Lovaður veri Gud og faðir várs Harra Jesu Krists, sum eftir miklu miskunn sína hevur endurføtt okkum til livandi vónar fyri uppreisn Jesu Krists frá deyðum, til ein óforgongiligan og óspilluligan og ófølnandi arv, sum er goymdur í himlunum til tykkara, – tit, sum vit Guds kraft verða varðveittir við trúnni til ta frelsu, sum er liðug at verða opinberað í teirri síðstu tíðini, sum tit skulu fegnast um, tó at tit nú eina skamma stund, um so skal verða, kenna harm í mongum ymsum royndum, fyri at tykkara roynda trúgv, sum er nógv dýrmætari enn hitt forgongiliga gullið, sum tó verður roynt í eldi, má verða funnin til lovs dýrdar og heiðurs í opinbering Jesu Krists, hann, sum tit ikki hava sæð, men tó elska, hann, sum tit, tó at tit ikki nú hava hann fyri eygum tykkara, tó trúgva á, skulu fegnast um við ósigiligari og dýrmettari gleði, tá ið tit náa málið fyri trúgv tykkara, frelsu sálanna. Um hesa frelsu hava profetar grundað og rannsakað, teir sum profeteraðu um ta náði, sum skuldi verða tykkum fyri, í tí at teir grundaðu um, hvørja ella hvussu vorðna tíð andi Krists, sum var í teimum, vísti fram á, tá ið hann frammanundan vitnaði um líðingar Krists og um ta dýrd, sum har aftaná skuldi koma; tí at tað var teimum opinberað, at tað ikki var teimum sjálvum, men tykkum, teir tænaðu við hesum, sum nú er tykkum kunngjørt av teimum, sum hava boðað tykkum gleðiboðskapin í hinum heilaga anda, sum varð sendur frá himli, og inn í hetta tráa einglarnir eftir at skoða. 1. Pæt. 1, 3–12.

Eg vil hervið enda við einum páskasálmi, sum eg havi yrkt til páskirnar 2001. Gleðiligar páskir øll somul.

## Páskasálmur

*Lag: Sum vársól rísur yvir fold. Bf. 206. Dk. 382*

Upprisni Harri, frelsari,
tú yvir deyða sigraði,
á halga páskadegi,
tá lívið tú mær aftur vann,
tí tøkk eg nú tær veita kann,
og syngja hátt av gleði.

Á hesi páskamorgunstudn,
eg leiti á tín náðifund,
og falli tær til kníggja,
tí at tú frelsu veitt mær,
tú allar mínar syndir bar,
so Sátan má tá flýggja.

Djúpt í synd eg fallin var,
ímóti glatan vegur bar,
sá vónloysið og deyða;
í kærleika meg Jesus sá,
hann frelsti meg, halleluja
við sínum blóði reyða.

Tí kann eg Gudi syngja prís,
sum opnað hevur paradís,
av síni stóru náði,
hans kærleiki her til mín røkk,
hvørt trælaband tá sundur støkk,
lov, tøkk og prís Gud fái.

**Kjartan Stakksund**

gult15 cyan15 magenta15 svart15




## Føroya Landsbókasavn

Á Føroya Landsbókasavni er eitt starv sum bókavør›ur leyst at seta 1/6-2001 ella skjótast gjørligt.

Uppgávan er, saman vi› Stovnstænastuni á Landsbókasavninum, at fyrireika til skrásetingar og at skráseta bókligt tilfar á vinnu- og mi›námsskúlum landsins. Starvi› ver›ur fyribils sett til 31/12-2001, um ney›ug játtan fæst ver›ur setanin longd til 31/12-2002.

Til starvi› krevst útbúgving sum bókavør›ur.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálast‡ri › og Starvsmannafelagi›.

Umsóknir vi› próvskjølum ver›a at senda Føroya Landsbókasavni í seinasta lagi 30/4-2001.

FLB
**Føroya Landsbókasavn**
J. C. Svabosgøta 16
Box 61 - 110 Tórshavn





## FÓÐUR

...altið til kappingarførar prísir

Vit hava nú fingið stórt úrval av seteplum og kunsttøðum á goymslu.
Set teg í samband við eina av deildum/umboðsmonnum okkara,
og bílegg í dag.
Vit senda kring alt landið.

**Seteplir:**
Folva 25 kg.
Oleva 25 kg.
Up to date 25 kg.
Sini 40 kg.

**Kunsttøð:**
Kálksaltpeter 40 kg.
N.P.K. til eplir 15-4-12 25 kg.
N.P.K. til gras 19-4-11 50 kg.
N.P.K. til eplir 0-3-20 25 kg.
Nitrophoska 22 kg.

MBM

MBM-Fóður
410 Kollafjørður
Tel.: 421478

MBM-Fóður
188 Hoyvík
Tel.: 421300

MBM-Fóður
800 Tvøroyri
Tel.: 372454

MBM-Fóður
700 Klaksvík
Tel.: 457249

P/F Niðri á Møl
220 Skálavík
Tel.: 361231

Kirkjuteig
210 Sandur
Tel.: 361072

Hjá Peturi
360 Sandavágur
Tel.: 333320



## Skrivstovufólk

Søkt ver›ur eftir skrivstovufólki til ein av kundum okkara, at byrja beinanvegin ella eftir nærri avtalu.

Arbei›i› fevnir um bókføring og lønarroknskap, umframt alt vanligt skrivstovuarbei›i.

**Førleiki:**
Útbúgving innan bókhald/skrivstovuarbei›i og ella royndir frá bókhaldsarbei›i/skrivstovuarbei›i er ein fyrimunur, eins og kunnleiki til n‡tslu av teldu.

**Løn:**
Løn ver›ur goldin smb. avtalu.

**Uppl‡singar og umsókn:**
Nærri uppl‡singar kunnu fáast vi› at venda sær til Dianu Heinesen, tlf. 441666. Umsókn vi› avritum av møguligum prógvum skal sendast til Spf Grannsko›arastovuna, 480 Skála, innan 15/4-2001.

**Spf Grannsko›arastovan**
480 Skála
Tlf. 441666



***Leikhúsi› Gríma***

s‡nir leikin

## *Eitur naka› land Week-end?*

av Jóanes Nielsen

leikstjórn Ey›un Johannessen

á Meiarínum

**2. páskadag 16.04.2001 kl. 18.00**
**t‡skvøldi› 17.04.2001 kl. 20.00**
**mikukvøldi› 18.04.2001 kl. 20.00**

Atgongumerki á kr. 100,- fáast á Kunningarstovuni og vi› dyrnar 1 tíma undan s‡ning. Bólkar uppá 10 ella fleir fáa 20% avsláttur.



## 50 Leirvíksfjarðarleiðin

Frá 12 april til 30. apríl, siglir M/F Scania eftir hesi ferðaætlan:

Siglingartið: 40 min.

| | Klaksvík | | Fuglafjørður | |
|---|---|---|---|---|
| Dagur | Kl. | Viðm. | Kl. | Viðm. |
| x | 06:00 | Samb. við 400 | 06:50 | |
| x6 | 07:50 | | 08:40 | |
| x67 | 09:40 | Samb. við 400 | 11:10 | Samb. við 400 |
| x67 | 12:20 | Samb. við 400 | 13:35 | Samb. við 400 |
| x6 | 14:45 | Samb. við 400 | 15:35 | Bíða 20 min |
| x67 | 16:45 | Samb. við 400 | 17:35 | Samb. við 400 |
| x67 | 18:25 | Samb. við 400 | 19:35 | Samb. við 400 |
| 7 | 20:25 | | 21:15 | Samb. við 400 |

2. páskadag verður siglt sum sunnudag.

Snarbussur millum Tórshavn og Fuglafjørð gerandisdagar:

Fuglafjørður - Tórshavn kl. 06:45
Tórshavn – Fuglafjørður kl. 16:20

Barsskor siglir í sambandi við flogrutuna sunnudag og 2. páskadag. kl. 07:15 av Klaksvík.

STRANDFARASKIP LANDSINS
Rutuupplýsingin. tlf. 34 30 30
Heimasíðan: www.ssl.fo



## Frá Eigarafelagnum Nor›asta Horn

Ársa›alfundur ver›ur mikukvøldi› tann 25. apríl kl. 20.00 í b‡lingshúsinum.

**Nevndin**



## Kontór og lagurhølir

Ca. 850 m² uppi í Hoyvík er til leigu. Gó›ir tilkoyrings- og parkeringsmøguleikar.

**Sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn
**Bill.mrk. 171**



## Avloysari

Søkt ver›ur eftir avloysara fyri dagrøktarlei›ara í barnsbur›arfarloyvi.

Avloysarin ver›ur settur í eitt hálvt ár frá 07.05.2001.

Umsóknir skulu ver›a kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 25.04.2001.

**Sjóvar kommuna**
490 Strendur



Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!